

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 02 - 2013

# Oljuframleiðslan fer at broyta heimspolitikkin

Fer oljuprísurin undir 100 dollarar fyri tunnuna, fara fleiri OPEC limalond, teirra millum Saudi Arabia, Kuwait og Sameindu Arabisku Emiratini, at skerja oljuframleiðsluna munandi. Hetta ger tann kuwaitiski tjóðbankin greitt í eini frágreiðing. Kuwaitiski tjóðbankin sigur, at hægri oljuframleiðsla enn væntað i Norður Amerika og øðrum londum, sum ikki eru limir í Opec, kann hava við sær lækkandi oljuprísir. Citi Group sigur í eini frágreiðing, at tann vaksandi olju- og gass framleiðslan í Norður Amerika, fer at hava stóra geopolitiska ávirkan, broyta amerikanska uttanríkispolitikkin og fer at broyta alheims orkustøðuna. Frágreiðingin sigur, at USA og Kanada verða netto útflytarar av olju um fá ár, og hetta fer at hava stóra ávirkan á eftirspurningin úr Vestur Afrika, Miðeystri, Venezuela, Meksiko og Russlandi fyri ikki at siga kann koma ístaðin fyri olju haðani.